# Litirnir eru høvuðsinnihaldið



*Hósdagin 14. juni letur Sofus Poulsen, listamaður, upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eins og undanfarin ár letur Sofus Poulsen, listamaður, upp summarframsýning sína í Smiðjuni í Lítluvík hósdagin 14. juni kl. 14.

Um hesa framsýningina sigur Sofus, at litirnir og samanspælið millum litirnar eru høvuðsinnihaldið í teimum 20 oljumálningunum, hann hevur við á framsýningini.

Hann heldur sjálvur, at hann hevur flutt seg nógv síðan ta fyrstu framsýningina, hann hevði í Smiðjuni í 1993.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 14. juni, allar dagur frá kl. 14-18, har øll eru vælkomin.

# Jack Petersen á Ólavsøku-konsertina



Í gjár boðaði Jóansøkufestivalurin frá, at Jack Petersen verður á skránni hjá festivalinum. Men eisini í Havn verður møguleiki, at hoyra mergjaða søgusigaran siga frá. Á Ólavsøkukonsertini verður Jack at hoyra í tí líki, ið hann er best kendur og dámdur millum føroyingar. Hann fer nevnliga at siga frá um hendingina í Danmark, tá hann bleiv stungin av einum ørum, vápnaðum dana. Hetta stóð at lesa á kjaksíðuni, kjak.fo, leygardagin. So við hesum kann staðfestast, at Jack verður at hoyra fleiri ferðir í summar.

Sosialurin
Sosialurin i

**Dagurin**

**14. juni. Rufinus,** deyður umleið ár 300. Rómverskur hermaður, sum saman við øðrum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sam Høgnesen**, ættaður úr Elduvík, búsitandi í Esbjerg, andaðist mánadagin 11. juni, 56 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Mervin Dimon, Tvøroyri**, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, í kirkjuna í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin klokkan 13. Tey ið vilja minnast Mervin kunnu lata eina peningagávu til Suðuroyar Ellis og Røktarheim, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu okkum samkenslu og vóru nærverandi, tá okkara kæra kona og mamma

**Esther Abrahamsen**
Tórshavn

andaðist á Mørkini í Streymnesi og varð jarðað í Havn.
Takk, Heri Joensen, fyri umsorgan og góð orð bæði har norðuri á Mørkini og síðani í Havn. Takk øll tit í Heilsuverkinum, sum sum onkusvegna vóru um Esther, meðan hon livdi. Takk fyri heilsanir, kransar og blómur og hjálp til jarðarferðina. Takk starvsfelagar fyri stuðul!
Eina serliga tøkk senda vit tykkum á Røktarheiminum Mørkini, fyri tykkara umsorgan fyri Esther og okkum, sum varaðu av, og sum gjørdi hennara seinastu tíð so góða og virðiliga, sum til bar. Takk øll tit, sum fylgdu Esther til hennara seinasta hvíldarstað. Og at enda eina tøkk til familjurnar, som hava hjálpt so nógv!

**Símun og Pól Laurits**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, í stóru sorg okkara, tá kæra kona, mamma, vermamma og omma

**Jóhanna Hansen**
Klaksvík

so brádliga andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Niels Paula Danielsen, prest, og Hanus Simonsen fyri troystarríku orðini í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og hornblástur.
Tøkk til tykkum øll, sum vitjaðu inn á gólvið og øll tykkum, sum hjálptu til heima og í samband við ervið.
Tykkum á onkulogisku deild á Landssjúkrahúsinum takka vit hjartaliga fyri hjálp og stuðul. Ein serstøk tøkk til Boga Davidsen lækna fyri hjálp í Danmark.
Tøkk fyri blómur og kransar og fyri peningagávurnar til Landsfelagið fyri Autismu.
Øllum tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað takka vit hjartaliga.

*Familjunnar vegna*
**Hans Olav, Annika, Petur Martin, Ólavur og Martina**